**UTTAN ÚR HEIMI**

## Norðmenn drekka meiri

Norðmenn hava drukkið meiri í summar, enn vanligt hevur verið. Einkarsølan sigur, at í juli drukku næstan allir norðmenn meiri, enn teir plaga at gera. Bara í Oslo drukku fólk minni.

Tølini hjá einkarsøluni vísa, at yvirhøvur drukku norðmenn 0,9 prosent meiri í juli í ár enn í sama mánað í fjør. Í Aust-Agder var meirnýtslan heili 18 prosent og í Nordland, har tað hevur verið óvanliga heitt í summar, drukku fólk 17 prosent meiri, enn tey plaga at gera í juli mánað.

Í Oslo minkaði sølan harafturímóti 0,2 prosent, sjálvt um summarið eisini hevur verið ógvuliga gott har.

## Ivi um al-Qaeda

Amerikanarar eru ikki nøgdir við eina nýggja frágreiðing hjá ST, sum sigur, at yvirgangsfelagsskapurin al-Qaeda virkar væl enn, og hann framvegis eigur at verða mettur sum ein verulig hóttan. ST sigur eisini, at amerikanska átakið at steðga øllum pengaflutningi til al-Qaeda hevur minni enn so havt ta ætlaðu ávirkanina.

Talsmenn hjá amerikansku stjórnini halda ikki, at tann nýggja frágreiðingin gevur eina veruliga mynd av viðurskiftunum.

Í ST-frágreiðingini stendur m. a., at limir í al-Qaeda hava millum 225 milliónir og 2,2 milliardir krónur, men at tað bara hevur eydnast at leggja hald á 110 milliónir krónur í ár.

## Avsannar hópgravir

Ein av fremstu sameindu hjá USA í krígnum ímóti Taliban-stýrinum, krígsharrin Abdul Rashid Dostum, avsannar tíðindi um, at umleið 1.000 fangar doyðu, tá Norðursamgongan hjá Dostum hevði teir í varðveitslu.

Dostum, sum nú er varaforseti í Afghanistan, viðgongur, at umleið 200 talibanfangar doyðu, tá teir vóru á veg í fongsul seinasta heyst, men hann heldur uppá, at fangarnir doyðu av løstum, sum teir høvdu fingið í bardøgunum í Kunduz-landspartinum.

Mannarættindafelagsskapir vilja vera við, at umleið 1.000 fangar doyðu, tí teir vóru stongdir inni í bingjum og tí ikki fingu luft. Felagsskapirnir siga, at fangarnir vórðu jarðaðir í hópgravum, og ST hevur játtað, at hópgravir eru funnar har norðuri í Afghanistan.

## Drápsákærdur funnin

Umhvørvisverndarfelagsskapurin Greenpeace hevur nú funnið fyrrverandi nevndarformannin í Union Carbide,Warren Anderson, sum hevur verið eftirlýstur síðani eina vanlukku í indiska býnum Bhopal í 1984.

Minst 3.000 fólk doyðu tann 3. desember í 1984, tá eitrandi gass lak út á einari verksmiðju, sum amerikanska felagið Union Carbide hevði í Bhopal. Indisku myndugleikarnir vilja vera við, at meiri enn 10.000 fólk doyðu seinni av gasseitran.

Seinastu ellivu árini hevur indiska løgreglan leitað eftir Warren Anderson, sum er skuldsettur fyri dráp í sambandi við vanlukkuna., men hann hevur ikki verið at finna. Nú hevur Greenpeace funnið hann í Hamptons beint uttan fyri New York.

# Nú skulu fransmenn eisini sleppa undan rættarsókn í ICC

**Franska stjórnin ger nú tað sama sum tann amerikanska og krevur, at franskir hermenn skulu heldur ikki latast krígsbrotsmannadómstólinum til rættarsókn.**

KRÍGSBROTSVERK
*Árni Joensen:*



*Franski forsetin, Jacques Chirac, og stjórn hansara krevja nú, at franskir hermenn skulu sleppa undan at verða drignir fyri krígsbrotsmannadómstólin í Haag næstu sjey árini.*

Seinastu tíðina hevur amerikanska stjórnin roynt at fáa onnur lond at vátta, at tey fara ikki at lata nýskipaða altjóða krígsbrotsmannadómstólinum ICC í Haag amerikanskar ríkisborgarar. USA hóttir við tiltøkum, vilja londini ikki gera eftir amerikanska kravinum, men higartil hava bara Ísrael, Rumenia og Eysturtimor slakað fyri trýstinum úr Washington.

Nú ætlar franska stjórnin at ganga somu leið. Tað váttaðu bretski uttanríkisráðharrin, Jack Straw, og svenski starvsfelagi hansara, Anna Lindh, fyri Svenska Dagbladet í gjár.

Jack Straw segði, at franska stjórnin krevur, at franskir hermenn, sum taka lut í altjóða friðarverndartiltøkum, skulu ikki latast dómstólinum í Haag, og at skipanin skal galda í sjey ár. Hann helt tó ikki, at talan er um allar teir fronsku hermenninar.

Tíðindini um franska kravið koma, júst sum ES-nevndin hevur endurtikið, at ES fer ikki at slaka fyri amerikanska kravinum. Bæði Danmark og Svøríki hava sagt, at tey kunnu ikki góðtaka amerikanska kravið.

Norska stjórnin hevur eisini fingið áheitan úr USA um at skriva undir ein sáttmála um ikki at flýggja krígsbrotsmannadómstólin um amerikanskar ríkisborgarar, men stjórnin í Oslo hevur víst áheitanini aftur.

USA vil ikki samstarva við ICC og krevur, at amerikanarar skulu ikki dragast fyri dómstólin. Amerikanska stjórnin ber ótta fyri, at amerikanarar kunnu verða sendir til Haag av politiskum orsøkum, og stjórnin hevur hótt við at taka sínar hermenn úr teimum friðarvarðveitandi deildunum hjá ST, fær hon ikki undirtøku fyri hugsan síni.

ST-trygdarráðið hevur samtykt, at amerikanskir ríkisborgarar skulu ikki dragast fyri ICC tað fyrsta árið t.v.s. til 1. juli næsta ár, men stjórnin í Washington vil hava hetta til eina varandi skipan. Tí hevur ST víst aftur.

# Statoil boðar frá skerjingum

**Oljufelagið hevur ikki tørv á so nógvum útgerðarstøðum longur, og tað kann kosta nógv arbeiðspláss.**

OLJUVINNA
*Árni Joensen:*

*Statoil skal skerja talið á rakstrar- og útgerðarstøðum, og tað kann kosta nógv arbeiðspláss.*



Leiðslan í stóra norska oljufelagnum Statoil hevur boðað frá, at hon hevur gjørt av at skerja talið á útgerðarstøðum, samstundis sum broytingar skulu gerast í rakstrinum.

Olav Fjell, sum er aðalstjóri í Statoil, sigur, at leiðslan fer at venda hvørjum steini, og at eingin eigur at kenna seg tryggan.

Statoil hevur sum tað einasta norska oljufelagið fýra rakstrarstøð ymsastaðni í Noregi umframt fimm útgerðarstøð. Meiri enn 2.000 fólk arbeiða á rakstrarstøðunum og útgerðarstøðunum, men Olav Fjell sigur, at talið á rakstrarstøðum verður í øllum førum skert tey næstu árini.

Hann dugir ikki at siga, nær broytingarnar verða settar í verk, tí tílíkt arbeiði tekur tíð, sigur hann.

Norski oljumálaráðharrin, Einars Steensnæs, segði við blaðið Aftenposten í gjár, at tað er ikki nóg mikið einans at nýta fíggjarligar grundgevingar fyri teimum ætlaðu broytingunum hjá Statoil, men at tað eisini er umráðandi at hava økismenningina í huganum.

– Eg skilji væl, at aðalstjórin tosar, sum hann ger. Men her eru onnur áhugamál, sum eisini skulu havast í huga, segði Einar Steensnæs.

# Gluntan handaði Klaksvíkar Kommunu gávu

**Í lítlari móttøku hósdagin, handaði Gluntan vegna Tróndheimar kommunu bæði tí politisku og umsitingarligu síðunum av Klaksvíkar kommunu gávu. Móttøkan var ikki almenn, og var tað helst orsøkin til, at bert heilt fá fólk vóru til staðar**

MÓTTØKA
*Solby A. Eliasen*



*Jórun Høgnesen, formaður í mentanarnevndini í Klaksvíkar Býráð tekur her ímóti gávu, sum limir úr Gluntan handaðu vegna Tróndheimar kommunu*

Klaksvík:
Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík og Jórun Høgnesen, formaður í Mentanarnevnd Klaksvíkar Býráðs, tóku ímóti gávunum frá Tróndheimar kommunu. Tað var keramikkur frá eini gamlari keramikkfabrik í Tróndheimi, sum eitur Anne´s Keramik., fabrikkin byrjaði í 1797.

Gluntan kom til Klaksvíkar klokkan eitt við Dúgvuni og løgdu teir leiðina beint niðan í býráðshøllina, har fyrst Jórun Høgnesen beyð teimum at verða vælkomnum, síðani Christian Olsen, kunningarstjóri, segði teimum eitt sindur frá søguni um Klaksvík. Síðani segði Steinbjørn Jacobsen eisini nøkur orð, áðrenn ein av limunum í Gluntan tók orðið.

Hann segði millum annað, at nú hava Gluntan verið nakrar ferðir í Føroyum, men at tað altíð er hugaligt at koma aftur.

Hann segði eisini hvørjir limirnir eru í Gluntan og greiddi stutt frá gongdini hjá bólkinum, síðani hann bleiv stovnaður í 1965.

Síðani tosaði hann eisini um, hvat er hent í Tróndheimi, síðani Gluntan var í Føroyum seinast. Har nevndi hann millum annað 1.000 ára haldið í 1997, Heimsmeistarakappingina í skíð og prinsessubrúdleypið. Hann helt, at samanumtikið kundi sigast, at tað er hent nógv positivt bæði í Klaksvík og í Tróndheimi, síðani tað.

At enda tók hann skemtandi til, at Gluntan eru at meta sum næstbestu umboðsmenn fyri Tróndheim. Næstir eftir Rosenborg, sum enn einaferð er komið víðari í Champions League.

Síðani handaði hann býráðsformanninum og formanninum fyri mentanarnevndini gávurnar frá Tróndheimar kommunu.

Aftaná framførdu Gluntan so nakrar av teimum vælumtóktu sangunun hjá bólkinum. Talan var um eina heldur avmarkaða framførslu. Har var ongin mikrofon og onki tummusett. Men tað komu teir kortini sera væl frá. Trummuspælarin gjørdi ikki mætari enn at spæla upp á ein tóman guitarkassa og eina tóma karamellueskju.

Síðani var farið at fáa sær okkurt smávegis til matna og at sløkkja tostan. Jákup Ziskason hevði borðreitt við pinnamati.

Gluntan skal hava tvær konsertir, meðan teir eru í Føroyum. Eina í Trongisvági og eina á Kambsdali.

# Miða móti marknaðarføring

**Tekniskir studentar hava nú møguleika at læra seg at marknaðarføra fisk**

UNDIRVÍSING
*Gunnhild Dahl Niclasen*



*Enn er so stutt fráliðið, so næmingarnir vita ikki heilt, hvat tey vænta, men tey gleða seg til at sleppa í gongd við verkætlanararbeiði*

Klaksvík:
Tá ið næmingarnir á Tekniska Skúla í Klaksvík byrjaðu aftur í skúlanum eftir summarferiuna, sluppu teir at royna eina nýggja og spennandi lærugrein – Miðlar og Samskifti kallast hon.

Tað, sum miðlar og samskifti í høvuðsheitum snýr seg um, er at læra næmingar at lýsa og marknaðarføra eina vøru, har teir skulu royna at røkka einum málbólki við einum boðskapi, og hetta skal gera mun, so at meira verður selt av vøruni.

Miðlar og samskifti er ein lærugrein, sum eisini er at fáa á HTX skúlunum í Danmørk, og tá ætlanin var, at Tekniski Skúlin í Klaksvík - eisini kallaður Tekniski Studentaskúlin - skuldi bjóða sínum næmingum hesa vallærugreinina, hava lærararnir Linjón Jacobsen og Pól Laksafoss verið á vitjan á trimum skúlum í Danmark. Skúlin, sum teir valdu at samstarva við, var HTX í Odense, tí undirvísingin har líktist mest undirvísingini, sum ætlanirnar vóru, at føroysku næmingarnir skulu fáa.

Fyri at fáa lærugreinina at hóska inn í okkara samfelag eru lærararnir í samstarvi við Adrian Dalsá, sum er stjóri á Kósini, komnir ásamt um at knýta ein part av undirvísingini til fiskivinnuna, sum er okkara høvuðsvinna. Neyðugt er við fólki, ið dugir at selja fiskin til marknaðin í Evropa, og tá kemur samskifti inn í myndina. Tí er gott, at tekniski studentaskúlin leggur lunnar undir at fáa føroyska ungdómin áhugaðan í at duga at marknaðarføra fiskin, ið verður góðskaður í Føroyum, tí tað nyttar onki at duga hetta væl, um ongin veit, at vit duga væl at góðska fisk, sigur Pól Laksafoss.

Tekniski Skúlin í Klaksvík er einasti skúli í landinum, sum er farin undir at bjóða næmingum hesa lærugrein, tó hava aðrir skúlar í Føroyum onkra líknandi grein, men ongin av teimum er líka málrættað ella hevur líka nógvar undirvísingartímar um vikuna í hesi lærugrein sum Tekniski Skúlin í Klaksvík. Eitt annað, sum eisini ger, at lærugreinin ikki líkist øðrum, er, at hon er meira tøknilig, við tað at næmingarnir sjálvir sleppa at royna hesi ymisku evnini, teir læra um, ígjøgnum verkætlanir.

Miðlar og samskifti kemur undir lærugreinina tøkni, sum fyllir ein stóran part av tímatalvuni hjá tekniskum studentum. Í tøkni verða fleiri verkætlanir gjørdar um árið. Tá ið gingið verður á seinasta ári, vanliga kallað HT-3, er tøknilærugreinin komin upp á A-stig, og tá skulu næmingarnir velja eina deild, har teir skulu húsast ellivu tímar um vikuna. Áðrenn miðlar og samskifti eisini gjørdist ein valmøguleiki, vóru fýra deildar at velja í, og tær vóru timbur, el, maskin og prosess.

Lærugreinin er ætlað bæði nýggju og eldru næmingunum á skúlanum. HT-1 næmingar kunnu velja at hava lærugreinina á C-stigi, HT-2 næmingar hava ikki nakra ávísa deild, men kunnu ístaðin velja at gera verkætlanir á deildini miðlar og samskifti ella á einum av hinum áðurnevndu fýra deildunum.

### Ársætlan gjørd

Ein ársætlan er gjørd fyri árið hjá HT-3 næmingunum, sum hava miðlar og samskifti. Í hesi ársætlan er nógv spennandi á skránni, teir skulu m.a. gera fýra verkætlanir, ið skulu snúgva seg um prentaðar miðlar, margmiðlar (multimedia), loftmiðlar, og síðst í skúlaárinum skal ein próvtøkuverkætlan gerast. Eisini skulu næmingarnir royna seg við lýsingum.

Í løtuni snýr undirvísingin seg mest um at læra at nýta tey ymisku telduforritini, nevnast kunnu illustrator, photoshop, quark og 3D, sum seinni verða hent at duga, tá farið verður at gera verkætlanir.

Hølið, sum undirvíst verður í, er í Gamla Tekniska Skúla, ið er settur í stand bæði uttan og innan. Skúlastovan er ljós, rúmlig og høgt er til loftið. Teldurnar og borðini, ið arbeitt verður á, er nýtt, borðini eru gjørd á skúlanum til sama endamál (hesi hava skúlavørðirnir Theodor og Sørmund gjørt), so sigast kann ikki annað, enn at umstøðurnar at undirvísa í nýggju lærugreinini eru avbera góðar.

Elin Højgaard og Ulrik í Hjøllum, sum eru HT-3 næmingar, hava valt at hava miðlar og samskifti á A-stigi, og tey væl nøgd við undirvísingina, sum tey higartil hava fingið, og mest gleða tey seg til at gera lýsingar. Alt hetta er enn nýtt fyri báðar næmingarnar, og tí vita tey ikki rættiliga, hvat tað fer at føra til, men bæði meina, at undirvísinigin tykist frí og spennandi.